

# Ræddi gestir og løgreglu við pylsum

Ein 23 ára gamal kinverji lumpaði bæði matstovugestir og løgreglu á eini matstovu í Benxi í Kina um dagarnar. Hann hótti nevniliga við at spreingja bæði matstovu og gestir í luftina við dynamitstengrum, sum hann hevði fest rundan um seg. Gestirnir vóru hjartkiptir, tá uppøsti maðurin var í hørðum kegli við løgregluna, sum kom á staðið. Saman við dynamitstengrunum hevði ungi maðurin fest eitt battarí - so, hetta sá rættiliga álvarsamt út. Tá bumbuserfrøðingar eisini komu inn á matstovuna, sóu teir skjótt, at hetta ikki vóru dynamitstengur, men reyðar pylsur, sum maðurin hevði fest rundan um seg. - Tá vit sóu, hvat hetta í veruleikanum var, kundu vit ikki lata vera við at flenna, sigur ein av bumbuserfrøðingunum. Kinverjin hevur greitt frá, at hann kendi tunglyndi á sær, tí hann hevði gjørt upp við sína elskaðu. Sing He, sum hin 23 ára gamli kallast, sigur, at hann hevði brúk fyri, at okkurt spennandi hendi í lívi hansara eftir uppgerðina við gentu sína. Tað var annars ikki uttan orsøk, at løgreglan í Benxi tók málið í álvara, tí í 2007 vórðu 25 fólk dripin og 41 særd, tá ein bumba brast á einari barr - júst í hesum kinverska býi.

# Trøll og vill hús í Norðurlandahúsinum

Fríggjdagin 8. januar 2010 kl. 16.00 letur upp málningaframsýningin hjá Tórhild Tolfsen við abstraktum landsløgum við lítlum húsum og trøllum í Norðurlandahúsinum.

Við hesi framsýning vendir Tórhild Tolfen aftur til sítt gamla arbeiðspláss –Norðurlandaahúsið, har hon var køksleiðari árini 1983-1998.

Tá ið Tórhild Tolfsen fór frá við eftirløn sum 67 ára gomul, byrjaði ein nýggur partur av lívi hennara. Hon gjørdist listamálari, og hevur í dag havt málningar við á 40 ymsum framsýningum. M.a. hevur hon havt málningar við á framsýningum í Rundatorni, Gallerí Revolver í Keypkannahavn, Stadtwerk í Slesvík í Týsklandi, og var tað Joachim prinsur, sum læt upp hesa síðst nevndu framsýning upp.

Hetta verður 3 ferðin Tórhild Tolfsen hevur málningar við á framsýning í Føroyum. Stílurin í myndunum er við íblástri frá minnum úr Føroyum, blandað við trøllum og lítlum húsum, sum vaksa vilt.

Tórhild Tolfsen er í dag 78 ár, og málar dagliga í verkstaði sínum á Vesterbro í Keypmannahavn.

**-ave-**





*»Vilt vaksandi« hús ganga aftur á ymsar mátar í fleiri av málningunum hjá Tórhild Tolfen*



*Minnini úr Føroyum ganga eisini aftur sum trøll í listini hjá Tórhild Toftenw*

## Símun Jacobsen nýggjur prestur á Gjaranesi



**KIRKJAN**

*Eirikur Lindenskov*

Á fundi í gjárkvøldið varð Símun P. Jacobsen einmælt innstillaður til nýggjan sóknarprest í Sjóvar prestagjaldi.

Talan var um ein fund, har øll kirkjuráðini í sóknini vóru savnað til fund við tí í hyggju at innstilla tann nýggja prestin í Sjóvar prestagjaldi.

Í eina tíð hevur Henning Bøgesvang røkt kallið sum sóknarprestur í økinum, sum umfatar kirkjurnar á Selatrað, Strondum, Skála og Oyndarfirði. Nú fær kirkjufólkið altso sín fasta prest.

Símun P. Jacobsen kemur frá einum starvi sum sóknarprestur í Hvalba, har hann hevur verið fyribils settur fram til 31. desember í fjør. Sunnudagin hevur hann fráfaringargudstænastur í Hvalba og í Sandvík.

Nýggi presturin verður innsettur við eina gudstænastu 17. januar.

## Danir tíma ikki at lesa bíbliuna




Bíblian er ein týdningarmikil bók, halda danir, men teir flestu av teimum lesa sjáldan í henni, um teir yvirhøvur eiga eitt eintak, veit Kristelig Dagblad at siga.

Sambært eini kanning, sum Det Danske Bibelselskab hevur gjørt, lesa fýra av fimm dønum nevniliga sjáldan ella ongantíð í bíbliuni.

Bert ein av hvørjum 12 dønum siga seg lesa javnan í bíbliuni, tað vil siga dagliga, eina ferð um vikuna ella eina ferð um mánaðin. Umleið 10 prosent siga, at tey lesa í bíbliuni nakrar ferðir um árið.

Skelkandi tøl

Aðalskrivarin í Bíbliulesiringinum, Roar Steffensen heldur nýggju tølini vera skelkandi.

Við Kristelig Dagblad sigur hann, at hevur sæð, at talið á haldararum á sonevndu bíbliulesiplanunum er minkað niður í 6.500 í øllum landinum.

Danski bispurin, Niels Henrik Arendt, heldur, at brúk er fyri eini meir fólksligari tilgongd til bíbliulesing.

- Fyri tey flestu er tað sera møtumikið at fara í holt við 1000 síður. Kanska kundi man ment onkra spennandi lesihjálp til at fara undir bíblinuna, heldur bispurin, sambært Kristelig Dagblad.

**-ave-**

# Sagnir savnaðar á Snar

**Føroyskar sagnir eru nú savnaðar á heimasíðuni Snar sum talgildur tekstur**

**MENTAN**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Higartil hava føroyskar sagnir at kalla bert verið til taks á prenti. Heilt fáar sagnir hava verið talgildar, og tær hava ligið spjaddar á ymsum heimasíðum. Nú verða so tær flestu kendu sagnirnar savnaðar á einum stað.



*Sagnirnar á Snar eru bólkaðar í øki, sum til ber at trysta seg inn á eina ávísa oyggj ella bygd á talgildum føroyakortti*

### Bólkaðar í øki

Í fyrsta umfari eru sagnirnar í "Sagnum og ævintýrum" hjá Jakobi Jakobsen lagdar á út á Snar. So við og við verða fleiri sagnir talgildaðar. Í næstum verða fleiri sagnir, sum V.U. Hammershaimb hevur savnað, lagdar út.

Sagnirnar eru bólkaðar í bygdir og býir. Á sagnasíðuni er eitt føroyakort, har til ber at trýsta seg inn á oynna ella øki, har bygdin ella býurin er. Oyggin ella økið gerst størri og kemur fram í skíggjan, og bygdirnar gerast sjónligar.

Hvør søgn hevur sína síðu. Á síðuni er søgnin sum alnetstekstur (html-tekstur), og eisini ber til at taka søgnina niður á pdf-fílu. Viðkomandi slóðir og tilfar verða knýtt at hvørjari søgn.

Árni Dahl hevur við játtan frá mentamálaráðnum staðið fyri at talgildað sagnirnar, og í samráði við Føroya Skúlabókagrunn er gjørt av at leggja sagnirnar á Snar.